

Savnsmynd

# Tórður Thomsen er aftur í B68

**FÓTBÓLTUR** Tórður Thomsen, sum hevur verið eykamálverji á landsliðnum seinastu tíðina, hevur skrivað sáttmála við B68

Tað skrivar heimasíðan hjá toftamonnum. B68 takkar samstundis Vlada Filipovic, sum hevur vart málið hjá toftamonnum seinastu trý árini. Serbin heldur ikki fram í felagnum. Tórður Thomsen fekk sína fótbóltsuppaling í Runavík. Hann spældi við B68 í 2006. Málverjin hevur síðan spælt við barndómsfelagnum NSÍ, AB og HB. Sáttmálin er galdandi fyri kappingarárið 2011.

*uni@sosialurin.fo*


*Eli Hentze til høgru*

# Eingin trupulleiki hjá Eli

**RENNING** Tað gekk útmerkað væl, sum Eli Hentze tekur til, við Føroyarenningini. 145 kilometrar í øgiligum veðri yvir sjey dagar eru lagdir aftur um bak. – Tað hevur verið ótrúliga stuttligt, sigur Eli Hentze um túrin kring oyggjarnar

**Rólant Waag Dam**

Eli Hentze ynskti at geva eitt sindur aftur av tí, hann hevur fingið frá fótbóltsfelagnum B71. Tí fór hann undir Føroyarenningina, eitt slag av stuðulsrenning, sum strekti seg frá Viðareiði til Sumbiar – 145 kilometrar yvir sjey dagar.

Í gjár kom 41 ára gamli Eli Hentze á mál.

– Tað gekk útmerkað væl, haldi eg, ljóðaði tað frá Eli Hentze í gjárkvøldið. Kropsliga hevði tað ikki verið nakar trupulleiki hjá honum sum so, hóast hann sum oftast rann omanfyri 20 kilometrar. Longsti teinurin var 29,4 kilometrar men tað var neyðugt við longum teinum, um teir smáu hálvtannaðhundrað kilometrarnir skuldu leggjast aftur um bak innanfyri ásettu tíðina.

Eli Hentze hevur eisini eitt arbeiða at passa, og tí var renningin løgd soleiðis, at bæði arbeiði og renning kundi passast hesar dagarnar.

– Og tað hava verið nakrir ógvuliga stuttligir dagar, har eg havi upplivað Føroyar á ein heilt annan hátt, enn í gjøgnum bilrútin, soleiðis sum vit vanliga gera tað, sigur Eli Hentze.

## Soleiðis eru Føroyar

Byrjað var á Viðareiði í ógvuliga ófantaligum veðri. Og ringa veðrið setti eisini sín dám á dagarnar, tá Eli Hentze rann. Tó so, onkur góður dagur var eisini. Men serliga tá veðrið var ófantaligt, fegnaðist Eli Hentze um, at hann ikki rann einsamallur.

– Men soleiðis eru Føroyar, flennir hann.

– Tað var bara einaferð, at eg rann einsamallur. Tað var úr Gundadali til Gomlurætt klokkan níggju um morgunin. Annars hevði eg altíð selskap og tað eri eg takksamur fyri, sigur Eli Hentze.

Tilsamans metir hann, at umleið 30 fólk hava runnið saman við honum á ymsu teinunum.

– Tað hevur verið stórur áhugi og undirtøkan hevur verið góð, er greiða fatanin hjá Eli Hentze, sum í gjár kom á mál heima á Sandi.

Freistin at lata inn pening til Føroyarenningina hjá Eli Hentze er til og við 3. desember.

*rolant@sosialurin.fo*

# Merkistein við nýggjari fótbóltsbók



*fsf.fo*

**FÓTBÓLTUR** Suni Merkistein og Fótbóltssambandið geva í desember út fyrsta av trimum bindum um føroysku fótbóltssøguna. Fyrsta bind eitur »Teir reystastu dreingir í norðum«

**Uni Holm Johannesen**

Í bókini verður greitt frá megintilburðum í føroyskum fótbólti frá upphavi fram til 1960. Søgan tekur við á leið 1890, tá fyrsta fótbóltsfelag í landinum er í umbúna. Tað verður sagt frá øllum royndunum at fáa í lag skipaðar kappingar millum føroysk feløg tíðliga í farnu øld. Tað verður varpað ljós á fyrstu steypakappingarnar og royndirnar við einum fótbóltssambandi longu í 1913 og aftur í 1930. Tað er skrivað um føroysku feløgini, sum verða stovnað hesi árini, hvussu føroyingar fingu samband við útheimin, hvussu samvinnan við Ísland og Hetland tók seg upp longu í 20-árunum, og vit frætta um forvitnisligar vitjanir í Føroyum tey árini.

Eftir at ÍSF varð stovnað í 1939, kemur rættilig ferð á. Í 1942 verður farið undir regluligu landskappingina, og í 1955 byrjar árliga steypakappingin. Hesi árini er fast landsdystarsamstarv við Hetland komið í lag, og tað verður roynt støðugt at víðka avbjóðingarnar. Fyrsta bindið er slakar 400 blaðsíður við myndum, lýsingum av spælarum og undangongumonnum, umframt talvur við úrslitinum frá dystum og kappingum.

Suni Merkistein hevur skrivað bókina, og Marni Mortensen hevur savnað saman fleiri hagtøl.

*uni@sosialurin.fo*